

# Eiler Jacobsen farin

Í morgun frættist, at Eiler Jacobsen er deyður, 80 ára gamal. Skjótt er Harranum um. Tann 30. juli fylti hann 80 ár. Tá vóru Eiler og Beinta í Spanien. Í seinastu viku frættist, at Eiler skuldi leggjast undir skurð fyrst í hesi vikuni. Útlitini vóru ikki søgd at vera ring. Men soleiðis skuldi ikki verða, og nú er hann farin í Harrans hendur.

Men eftir er minnið um ein kappa í føroyska samfelagnum. Tað varð skrivað um hansara søgu í samband við føðingardagin, og skal hon sum so ikki endurtakast.

Men Eiler var eitt rætt barn av føroysku lagnusøguni. Hann misti pápan 2 ára gamal við "Immanuel" í 1932.

Mamman, Helena, giftist aftur til Skálavíkar, og harvið gjørdist Eiler skálvíkingur. Hann byrjaðu sum fiskimaður, seinni gjørdist hann skipari. Aftur seinni gjørdist hann "sildakongur" bæði sum skipari og reiðari. Hann legði grundarlagið fyri, at uppisjóvarflotin gjørdist eitt satt gullnám bæði fyri reiðarar og fiskimenn. Hesin flotin er í dag ein av súlunum undir føroyska samfelagnum.

Eiler giftist við Beintu, dóttir Hjørdis og Petur Háberg. Tey fingu fýra børn, Sámal, Hjørdis, Petur og Eiler.

Sjálvur kom eg tíðliga at kenna Eiler. Vit bæði Beinta eru systkinabørn, og eg var enntá í brúdleypi hjá teimum í 1962.

Eiler gjørdist altíð tann sami, fiskimaðurin úr Skálavík, hóast hann kom á fremstu rók í føroyska samfelagnum og gjørdist gitin í altjóða fiskivinnuumhvørvi.

Hann hugsaði um fiskimenninar og teirra viðurskift. Hetta gjørdi hanni eisini, tá ið skipini hjá honum vórðu bygd. Hansara fyrsta skip "Ísborg" var sera væl útgjørt í so máta. Tá hann helt tað vera uppá tíðina at selja "Krúnborg" bar hann so í bandi, at manningin kundi fylgja við skipinum til nýggju eigararnar. Tað var ikki nøkur sjálvfylgja.

Eitt sum hevur eyðkent Eiler saman við Beintu er, at tey hava verið so familjukær. Tey hava altíð víst umsorgan fyri sínum, eisini so langt burtur sum systkinabørnum og teirra.

Tað var eisini stuttligt at síggja, hvussu góður Eiler var við vermammuna Hjørdis. Tey klemmaðust hvørja ferð tey sóust!

Kanska hevur Eiler ikki verið so væl fyri seinastu árini, gongulagið hevur ikki verið tað besta. Men fyri tað fór Eiler allastaðni. Her kundi hann ikki fingið eina betri konu enn Beintu, sum altíð var til staðar at stuðla. Men tað vóru eisini onnur, sum vóru góð við Eiler, og sum vildu geva honum eina hond, tá brúk var fyri tí. Hetta var Eiler eisini altíð so takksamur fyri.

Eiler var ikki smáligur. Hann fór spakuliga um hurðarnar, men tað er vist rættuliga fitt, sum hann hevur leskað endamálum av ymiskum slag, sum hann hevði áhuga fyri.

Tað mest sjónliga er tann bygningur, sum nú er við at verða bygdur í Skálavík.

Eitt er vist, at Eiler hevur sett varðar eftir seg í føroyska samfelagnum, sum koma at standa leingi.

Vit onnur koma at minnast hann við takksemi.

**ó.**

---

# *Kjak*



**Helena Dam á Neystabø**
*landsstýriskvinna í mentamálum*

# »Jú, samgongan raðfestir sanniliga útbúgving«

"Samgongan raðfestir ikki útbúgving", sigur tann nýsligni floksformaðurin í Sjálvstýrisflokkinum í stutta dómi sínum yvir løgtingsfíggjarlógaruppskotið 2011.

Man má siga, at nýggi formaðurin var skjótur at læra tann vanliga politiska andstøðuretorikkin at: "Alt sum samgongan ger, er skeivt – og serliga skeivt er tað, sum samgongan ger rætt ".

Lat meg sláa tað rimmarfast. Útbúgving er eitt av teimum heilt fáu økjunum, sum samgongan veruliga hevur raðfest á fíggjarlógini fyri 2011. Útbúgving og gransking er raðfest við góðum 40 milliónum kr. í 2011. Størstu hækkingarnar vóru til:

**Lestrarstuðul 12,9**
**Miðnáms- og yrkisútbúgvingar 12,5**
**Fróðskaparsetrið 2,2**
**Fólkaskúla- og sernámsøkið 3,8**
**ES-granskingarsamstarvið FP7 8,5**

Tað eru á heysti 2010 og á vári 2011 umleið 500 fleiri ung undir útbúgving, samanborið við talið av lesandi fyri summarfrítíðina í ár. Tað átti at verið ársins sólskinssøga.

Vit hava í ár tikið lesandi inn á allar megindeildir á Fróðskaparsetrinum – eg endurtaki, á allar megindeildir, og eisini øll skikkað sluppu inn at lesa til lærara og pedagog. Sambært uppgerð frá Setrinum pr. 1. september 2010 sluppu 68 inn til lærara og pedagog, á Sjúkrarøktarfrøðiskúlan sluppu 22 inn, á Søgu- og Samfelagsdeildina 48, á Náttúruvísindadeildina 68, og á Føroyamálsdeildina 19.

So tann akademiska og arroganta útsøgnin hjá Kára á Rógvu um, at nú mugu tey, sum ynskja sær eina útbúgving, bíða til onkur annar hevur gjørt seg lidnan, er so burturvið, at eg øtist.

Gamaní vóru tað nøkur, sum søktu, og sum ikki sluppu inn, m.a. tí at tað ikki ber til at hava fleiri enn 22 sjúkrarøktarlesandi í senn, og nøkur luku ikki upptøkutreytirnar. Allir hægri lærustovnar hava upptøkutreytir, og tað er neyðugt fyri trúvirðið í útbúgvingarskipanini.

Undir fíggjarlógarviðgerðini varð semja um at fremja sparingar, so at hallið á fíggjarlógini kann minka, og álagt varð Mentamálaráðnum at finna sparingar uppá 14,1 mió.kr.

Eftir summarfrítíðina varð greitt, at næmingatalið á vinnu- og miðnámsskúlunum og á Fróðskaparsetrinum varð uppaftur størri, enn vit høvdu væntað, tá ið játtanarkarmarnir vóru samtyktir í vár.

Tí varð neyðugt at spara væl meira enn tær 14 milliónir í 2011, serliga vegna øktan lestrarstuðul. Men heldur ikki hetta eyka spariumfarið hevur skert útbúgvingar møgleikarnar. Í samráð við vinnu- og miðnámsskúlarnar verða framdar nakrar rationaliseringar.Ein lítil skerjing í lestrarstuðlinum hjá heimabúgvandi miðnámskúlanæmingum, umframt aðrar smærri avmarkingar í lestrarstuðlinum, er skotin upp – tað er alt.

40 mió.kr. aftrat til útbúgving og gransking í eini tíð, har hallið á fíggjarlógini framhaldandi er omanfyri hálva milliard krónir, er sanniliga ein raðfesting, sum vit kunnu vera errin av.